## Síggj brot úr Tóroddur Poulsen filmi

Á heimasíðuni hjá Bluebird Film er eitt brot nú at síggja úr nýggja filminum hjá Katrin Ottarsdóttir um Tórodd Poulsen Til ber at downloada filmsbrotið á leinkjuni http://www.bluebirdfilm.dk/fo_index.html ”Ein regla um dagin má vera nokk” er heitið á filminum, sum er eitt portrett av rithøvundanum og myndlistamanninum Tóroddi Poulsen. Filmurin verður frumsýndur mikukvøldið 17. september og hóskvøldið 18. september á Bryggjuni, Strandgade 91, í Keypmannahavn. Føroysk frumsýning verður eftir ætlan í oktober í sambandi við filmsstevnu í Norðurlandahúsinum.



# Diddan úr Havn arbei

**Nú um dagarnar hittu vit í Havn vinkonurnar Mary Olsen og Elsuba Ellis f. Brimheim, vanliga kallað Diddan. Tað serliga við Elsubu er, at hon er ein av teimum mongu í USA, sum gera ein innsats fyri at fáa Barack Obama valdan til forseta í USA**



*Frá vinstru: Súsanna, systir Knút, Mary og Diddan*

FØROYINGAR Í USA
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Vinskapurin hjá teimum báðum stavar tó ikki frá Havnini, men úr California vestast í USA. Tær hava báðar eina áhugaverda søgu.

Mary er tann eldra av teimum. Hon er ættað av Nesi í Eysturoynni og giftist við Knút Olsen úr Havn. Hann var sonur Hedvig og Jóhannes Juul Olsen, sum búðu úti á Reyni í Havn. Her búðu Knút og Mary eisini fyrstu árini.

Knút var yvirmaður hjá Mærsk og var skipari í mong ár. Á veg heim til Føroya í september 1970 var hann í flogfarinum, sum datt niður í Mykinesi. Hann kom tó hampiliga væl burtur úr tí.

Í 1971 fær Knút til arbeiðis at vera ”portcaptain” hjá Mærsk í USA. Fyrst var hann eina tíð í New York, men flutti so yvir til San Francisco. Hansara arbeiði var at skipa fyri lossing og lasting, tá ið skipini hjá reiðarínum komu inn. Knút var roknaður av Mærsk fyri at vera sera dugnaligur í sínum arbeiði. Hetta gjørdi so tað, at Mary saman við yngsta soninum Johannes Juul flutti til USA, har hon kom at búgva í eini 30 ár.

### Kom inn í Demokratiskt umhvørvi

Diddan er dóttir Onnu f. Samuelsen, ættað úr Lorvík, og Otto Brimheim í Havn.

Hon kom á fyrsta sinni til USA sum 20 ára gomul í 1965. Hon hevði fyrst verið í Onglandi, men fekk so eitt arbeiði sum aupair genta hjá eini familju í høvuðsstaðnum í USA, Washington D.C. Samstundis, sum hon passaði børn, gekk hon í skúla.

Maðurin í húsinum var løgfrøðingur. Eitt av hansara arbeiðum var at vera ráðgevi hjá Joe Tydings, sum var limur í senatinum fyri Maryland, sum er ein grannastatur hjá Washington. Hann umboðaði demokratiska flokkin, og tað sama gjørdi adoptivipápi hansara Millard Tydings undan honum. Hann var limur í umboðsmannatinginum 1923-27 og í Senatinum 1927-51. Sjálvur var Joe limur í senatinum 1965-71.

Hetta heim var tískil sera nógv merkt av politikki. Nógv var eisini tosað um politikk við hús. Diddan kom hesa tíðina at fáa eitt gott innlit í amerikanskan politikk. Hon fekk ”pass” til senatið og plagdi at síggja Kennedybrøðurnar Edvard og Robert og aðrar kendar politikkarar. Robert stílaði jú eftir at verða forseti men varð myrdur í 1968. Edvard er framvegis limur í Senatinum. Eisini fekk Diddan atgongd til hægstarætt og slapp tá eisini at síggja, hvussu amerikanska rættarskipanin virkaði.

Hetta skapti ein serligan áhuga fyri politikki hjá Didduni, og hon gjørdist ein sannførdur stuðul hjá Demokratiska flokkinum.

Hon plagdi eisini at vitja



*Diddan býr í Truckee í California nærindis markið til Nevada*

Smitsonian Institute, sum umboðar 19 søvn og 5 granskingarmiðdeplar bert í Washington umframt ein hóp av stovnum um alt USA. Hetta var eisini stak læruríkt.

Her kom Diddan fyrstu ferð at smakka burgara, og sá eisini fyrstu ferð eina teldu. Hon var tó so stór, at hon fylti eitt heilt rúm!

Í Washington kom Diddan saman við eina føroyska gentu, Hildigarð úr Sumba. Hon arbeiddi sum húshjálp á donsku sendistovuni í Washington. Her arbeiddi eisini tá ein kendur føroyingur, nevniliga Einar Kallsberg, sum stórar vónir vóru settar til í Føroyum. Men tíverri doyði hann í besta aldri.

Hildigarð og Diddan avráða sínamillum, at tær skuldu søkja inn á sjúkrasystraskúlan í Føroyum, og tær verða báðar upptiknar.

### Fær samband við Mary

Tær koma so heim aftur til Føroyar. Her møtir Diddan ein ungan amerikanara, sum hevur sivilt arbeiði í Mjørkadali. Tey giftast í Føroyum.

Tey fluttu fyrst til Skotlands, har tey búsettu seg norðanfyri Aberdeen, og vóru har í hálvtriðja ár. Í Skotlandi fingu tey síni fyrstu børn, Scott og Anna.

Í november 1972 flyta tey til USA. Í fyrsta umfari búsetast tey í Kansas City, haðani maðurin var ættaður.

Tey flyta til California í 1974, og tá er tað, at tey fáa samband við Knút og Mary. Diddan hevði hoyrt um tey í Føroyum og hevði fingið teirra telefonnummar. Tey vóru eisini nærum grannar. Tað kann tað kallast í Amerika, tá ið tað bert eru 45 minuttir at koyra.

Diddan ringir so til Mary, sum bjóðar teimum at koma inn á gólvið. Hetta var byrjanin til teirra lívslanga vinarlag, sum millum annað hevur merkt, at Diddan hevur búð hjá Mary, nú hon hevur verið heima í Føroyum.

Stutt eftir fekk Diddan annars vitjan av Karen Wellejus. Hon er dóttir tann kenda danska radiohandlaran Fritjof Wellejus, sum var tann fyrsti, sum seldi radio í Føroyum. Hon var farin til Danmarkar undan krígnum, men var ein av teimum, sum ikki slapp heim aftur. Hon hevði kent Súsannu, systir Knút, og tann vegin komu tær at kennast. Karen var so eisini gift við amerikanara og búsett í Kansas City. Hon verður 85 ár í næstum.

Diddan kom nógv saman við Mary og Knút, og tey eru eisini faddrar hjá yngstu dóttir hennara, Miu Kristinu.

### Demokratiski flokkurin

Framvegis var Diddan ein íðin stuðul hjá demokratiska flokkinum. Men her var hon sera ósamd við Knút, sum sá stórt bæði í Nixon og Reagan, men tey vóru líka góðir vinir fyri tað.

Diddan er ikki amerikanskur ríkisborgari og sleppir tí ikki sjálv at velja. Men hon kann sannføra onnur. Í fyrsta umfari hevur tað verið hennara egnu børn, sum eisini taka undir við hennara flokki.

Her skal fyrst sigast, at valið í USA er ikki bert eitt forsetaval. Tað er ein rúgva